# GÍ javnaði í evstu løtu




*Sámal Joensen javnaði fyri GÍ í evstu løtu. Her dystast Sámal við verjuleikaran Fróða Clementsen hjá EB/Streymi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**EB/Streymur og GÍ býttu stigini, tá ið liðini hittust á Mølini á Eiði leygardagin, sum samstundis var seinasti landskappingardysturin hjá Súna Olsen fyri GÍ fyribils**

FORMULADEILDIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Dysturin á Eiði var ikki serliga væl spældur. Lítið hugflog var at síggja, og tað var sjáldan, at liðini bæði megnaðu at spæla seg til nakrar málmøguleikar.

Liðskiparin hjá GÍ, Súni Olsen, skrivaði mánadagin undir sáttmála við danska superligafelagið AaB, og tí var dysturin á Eiði seinasti landskappingardysturin hjá Súna fyri GÍ fyribils.

### Súni við í báðum málunum

Tað var kanska eitt sindur undrunarvert, at EB/Streymur legði út við eini rættuliga verjukendari uppstilling. Fimm mans vóru á miðvøllinum hjá heimaliðnum, meðan Sonni L. Petersen var einsamallur heilt frammi í álopinum. Tað hevði verið eitt sindur betur skiljandi, um mótstøðuliðið var eitt av teimum trimum oddaliðunum, men talan var altso um eitt av liðunum í niðara enda.

Ein tann besta møguleikan í fyrra hálvleiki fekk GÍ, tá ið teir høvdu eitt fríspark úr eini 30 metra fjarstøðu, ið Súni Olsen sum vant tók sær av. Landsliðsmaðurin langaði til, men René Tórgarð í EB/Streyma-málinum fekk akkurát beint bóltinum upp um tvørstongina, og so var tann vandin av.

Undan dystinum var eitt sindur ivasamt, um Sorin Anghel hjá EB/Streymi fór at verða tøkur, men rumenin var við frá fyrsta bríksli. Tað vísti seg tó, at Sorin ikki var heilt klárur, og hann noyddist av vøllinum, tá ið einans ein hálvur tími var leiktur, og Teitur Joensen kom á vøllin fyri hann. Hesin sami Teitur Joensen hevði eisini ein sentralan leiklut, tá ið heimaliðið legði seg á odda tíðliga í seinna hálvleiki. Súni Olsen missir bóltin á miðvøllinum, og Teitur Joensen strýkur avstað. Kviki kollfirðingurin stingur bóltin inn um verjuna hjá GÍ til Sonna L. Petersen, og toppskjúttin í fremstu deildini í fjør er eirindaleysur og langar bóltin framvið Marcin Dawid í GÍ-málinum.

Gøtumenn royndu at trýsta fyri at koma upp á javnt aftur, men tað var ikki fyrr enn heilt móti dystarenda, at tað endiliga bragdaði hjá GÍ. Enn einaferð var tað Súni Olsen, ið skeyt eitt fríspark nakað uttan fyri brotsteigin hjá EB/Streymi. Skotið rakti ein verjuleikara hjá EB/Streymi, og bólturin datt fyri føturnar hjá Sámali Joensen, sum ongar trupulleikar hevði av at senda bóltin í netið til 1-1, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

Dysturin leygardagin var enn eitt dømi um, at EB/Streymur hevur ilt við at halda tørn allar 90 minuttirnar. Teir hava fleiri ferðir í ár verið á odda til heilt móti dystarenda, men hava síðani mist á stokkinum.

Hjá GÍ verður tað spennandi at síggja, hvussu liðið fer at standa seg uttan Súna Olsen, sum, uttan at taka nakað frá hinum, er drívmegin á GÍ-liðnum.

## FAKTA

EB/Streymur-GÍ 1-1(0-0)
1-0 Sonni L. Petersen 57.
1-1 Sámal Joensen 89.

EB/Streymur: René Tórgarð – Gert Hansen, Andrzej Pazek, Fróði Clementsen, Jóhann á Stongum – Bárður Olsen, Knút Vesturtún (Brian Olsen 80.), Egil á Bø, Jákup Martin Joensen – Sonni L. Petersen, Sorin Anghel (Teitur Joensen 27.).
GÍ: Marcin Dawid – Jónreid Dalheim, Atli Gregersen, Robert Rzeczycki, Pól Henning Jacobsen – Símun Louis Jacobsen (Krzysztof Popczynski 71.), Magni Jarnskor (Áslakkur R. Petersen 65.), Sam Jacobsen (Kaj Ennigarð 80.), Hanus Jacobsen, Súni Olsen – Sámal Joensen.
Gult kort: Fróði Clementsen, Andrzej Pazek - Atli Gregersen, Pól Henning Jacobsen.
Dómari: Páll Augustinussen

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Allan Mørkøre | B36 | 8 |
| Hans á Lag | HB | 8 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 8 |
| Bogi Gregersen | Skála | 8 |
| Rúni Nolsøe | HB | 7 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 7 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 7 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 7 |
| Dan Djurhuus | VB | 7 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 6 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 6 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 5 |
| Óli Johannesen | TB | 5 |
| Símun Louis Jacobsen | GÍ | 4 |
| Heine Fernandez | HB | 4 |
| Jákup á Borg | HB | 4 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 4 |
| Atli Danielsen | KÍ | 4 |
| Andy Olsen | NSÍ | 4 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 4 |
| Milan Kulic | VB | 4 |

Besti málskjúttin í fyrstu deild fær eftir kappingarárið handað gylta skógvin frá Adidas

## Kappróðurin við í morgin

Stór frásøgn frá kappróðrinum á Fjarðastevnu verður í blaðnum í morgin.

## formuladeildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skála | 16 | 9 | - | 5 | - | 2 | 34 | 17 | 17 | 32 |
| 2 B36 | 16 | 9 | - | 5 | - | 2 | 22 | 7 | 15 | 32 |
| 3 HB | 16 | 10 | - | 2 | - | 4 | 46 | 18 | 28 | 32 |
| 4 NSÍ | 16 | 6 | - | 6 | - | 4 | 25 | 21 | 4 | 24 |
| 5 EB/Streymur | 16 | 5 | - | 7 | - | 4 | 17 | 23 | -6 | 22 |
| 6 ÍF | 16 | 4 | - | 4 | - | 8 | 19 | 40 | -21 | 16 |
| 7 GÍ | 15 | 4 | - | 3 | - | 8 | 19 | 25 | -6 | 15 |
| 8 VB | 16 | 4 | - | 3 | - | 9 | 18 | 29 | -11 | 15 |
| 9 KÍ | 16 | 4 | - | 2 | - | 10 | 21 | 31 | -10 | 14 |
| 10 TB | 15 | 3 | - | 5 | - | 7 | 13 | 23 | -10 | 14 |

Lesið Sosialin

## Birgir skal døma finaluna

Nú er greitt, at tað verður Birgir Sondum, ið skal døma finaluna um Løgmanssteypið á ólavsøku. Birgir hevur áður roynt seg sum dómara í steypafinaluni, og tað var í 2002, tá ið NSÍ vann 2-1 á HB.

**tn**